Fløguútgáva:

# »Ein undurkelda« í Norðoya Sparikassa



*Brøðurnir Eyðun og Steinbjørn Jacobsen syngja saman*



*Eyðuni Jacobsen syngur undir móttøkuni seinasta fríggjadag*

**Fríggjadagin 1. desember var móttøka í Norðoya Sparikassa í Saltangará í sambandi við at Eyðun Jacobsen á Glyvrum gevur út fløguna »ein undurkelda«**

MÓTTØKA
*Myndir: Høgni Thomsen*

Norðoya Sparikassa skipaði fríggjadagin 1. desember fyri móttøku og hugnaløtu á deildini í Saltangará í sambandi við at Eyðun Jacobsen á Glyvrum gevur út fløguna "ein undurkelda"

»Ein undurkelda«, við íalt tólv løgum, er fyrsta fløgan, sum Eyðun Jacobsen hevur givið út.

Fløgan er føroysk. Umframt svenska trummuspælaran Klas Anderhell, eru bert føroyskir tónleikarar, kórsangarar og tøkningar við.

Tað er kortini ikki bert Eyðun, sum syngur á fløguni. Sjálvur syngur hann níggju av sangunum, meðan tríggjar døtur hansara syngja hvør sín sang.

Á fløguni eru fyri tað mesta gamlir og kendir sangir, sum nógv eru sungnir í samkomunum kring landið. Hetta eru eisini sangir, sum eg eri uppvaksin við og havi sungið gjøgnum øll barnaárini, sigur Eyðun Jacobsen.

---

## Andlát og jarðarferðir

**Christoffer Joensen, ættaður úr Sandvík, búsitandi í Vági**, andaðist sunnukvøldið á Suðuroyar sjúkrahúsi, 81 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verðu úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13.

**Ádelaida Olsen, vanliga nevnd Ádelaida á Reyðhúsi**, andaðist mikumorgunin á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Kistan fer frá kapellinum leygarkvøldið kl. 20 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni sunnudagin kl. 13.30.

**Frida Rønje, fødd Hammer, ættað av Eiði, búsitandi í Rudkøbing - Danmark**, andaðist í heiminum leygardagin 2. desember, 84 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin 8. desember kl. 13 úr Rudkøbing kirke.

## The Child

*I saw you again*
*Your smile was gone*

*I saw you in pain*
*Your time was drawn*

*You shed a tear*
*I wiped it off your cheek*

*You touched me*
*I trembled, I felt weak*

*A burning sensation*
*Entered my heart*

*I looked away*
*You tore me apart*

*For the first time I cried*
*I wanted to stop, I swear I tried*

*You fell in my arms*
*Like a child would*

*I kissed you twice*
*As best as I could*

*I closed your eyes*
*You opened mine*
*I saw how a lovely person dies*

**By: Anna Iachino © KODA 2006**
**(written in 1976)**

---

# Føroyar fingið næstformann í altjóða felagsskapi

**Leiðarin á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík er nú næstformaður í altjóða felagsskapinum hjá trygdarmiðstøðum, IASST**

ALTJÓÐA SAMSTARV
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Eftir uppskoti úr USA er Marius Magnusson valdur til næstformann í altjóða felagsskapinum hjá trygdarmiðstøðum.

Felagsskapurin, sum eitur The International Association for Safety an Survival Training, varð stovnaður í 1980, og Marius Magnusson hevur umboðað Føroyar í felagsskapinum seinastu fimm árini.

– Eg valdi at taka av tilboðnum um at stilla upp, tí eg meti, at vit hava nakað at geva felagsskapinum út frá teimum royndum, sum vit hava gjørt, sigur nývaldi næstformaðurin í IASST.



*Marius Magnusson*

**Dagurin**

**8. desember. Gitnaðardagur Mariu. Mariumessa**, hildin til minnis um, tá ið hon var gitin í móðurlívi.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo